# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Ása Ellefsen 70

14. februar fylti Ása Ellefsen 70 ár. Ása vaks upp í Miðvági, sum triðja barn av átta hjá Sofíu, fødd Højgaard, heilsusystur úr Rituvík, og Eliasi Ellefsen, keypmanni.

Ása gekk í preliminerskúla og tók studentsprógv í Havn. Síðani fór hon til Keypmannahavnar, har hon fór í læru sum laborantur á Bispebjerg Sjúkrahúsi. Heimafturkomin starvaðist hon sum laborantur á Landssjúkrahúsinum, til hon fór á Læraraskúla, har hon tók prógv í 1981. Eisini hevur hon eftirútbúgving sum serlærari.

Ása fekk sálarfrøðiligt embætisprógv sum cand. pæd. psych. í 1990. Hon hevur autorisasjón frá Dansk Psykolognævn og er góðkend sum barnaserkøn av landsstýrismanninum í almannamálum. Hon hevur arbeitt sum ráðgevi í barnaverndarmálum hjá fleiri kommunum og í sambandi við rættarmál. Eisini hevur hon undirvíst lesandi á Sjúkrarøktarfrøðingaskúlanum og hildið fyrilestrar á stovnum og fyri dagrøktarmammum kring landið.



Ása starvaðist sum leiðandi skúlasálarfrøðingur í Sernámsfrøðiligu Ráðgevingini í Landsskúlafyrisitingini í árunum 1991 til 1994. Hon virkaði sum skúlasálarfrøðingur og deildarleiðari á Sernámsdeplinum til apríl 2001.

Saman við Maritu Petersen, sálu, fór Ása í holt við gransking av autismu hjá føroyskum børnum og ungum. Verkætlanin, sum koyrir enn, verður framd í samstarvi við Sernámsdepilin og Christopher Gillberg, professara við lærda háskúlan í Gøteborg.

Ása hevur virkað sum privatpraktiserandi sálarfrøðingur síðani 2001. Nú, hon hevur rundað tey sjeyti, hevur hon avmarkað tær løntu arbeiðsuppgávurnar og er farin í holt við at lesa føroyskt á Fróðskaparsetrinum umframt at læra seg spanskt. Harumframt hevur hon sett sær fyri at gera øllum ommubørnunum føroysk klæðir.

Hon giftist í 1962 við Halgiri Winther Poulsen, sakførara. Tey fluttu til Hoyvíkar í 1967, og har hava tey búð síðani. Ása og Halgir hava 4 børn og 12 ommu- og abbabørn.

Føðingardagurin hjá Ásu varð hildin við stórari veitslu hjá bróðrinum Peturi og bróðurkonuni Jórun á Vatnsoyrarvegnum. Vit ynskja Ásu hjartaliga tillukku við stóra degnum.

†

### Andlát og jarðarferðir

**Hasly Andreasen, Norðoyri**, andaðist á Klaksvíkar Sjúkrahúsi leygarmorgunin 14. februar, 51 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Henrikka Hansen, Sandavágur**, andaðist á Sýnuni í dag 48 ára gomul.

### Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá ið okkara kæra mamma, omma, vermóðir og langomma

**Janhild Ulrikka Sørensen**

andaðist og varð jarðað.
Takk til Christianskirkjuna, kirkjutænarar og Hanus Simonsen, prest, fyri uggandi orð.
Takk til tykkum, sum hjálptu til við ervinum.
Hjartans tøkk til tykkum øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Páll Sigmund og Sólfrí**

## Konsert í Ebenezer




Leygardagin 21. februar kl. 21 verður skipað fyeir eini konsert í Ebenezer. Fyrireikararnir siga, at skráin verður fjølbroytt við kendum og minnið kendum andaligum tónleiki - alt frá country til klassiskt klaverspæl.

Tey luttakandi verða: Ebenezer Housband, Kristina Bærentsen, Beinta Jacobsen, Jona á Váli Olsen og Bárður Tindskarð.

Umframt tónleikin kemur Jákup N. Olsen at hava eitt stutt orð. Tiltakið varar í umleið 60 minuttir.

Tað eru tey ungu í Ebenezer, ið samskipa konsertina sum er fyri øll. Eftir konsertina eru øll vælkomin til ein kaffimunn, siga fyrireikararnir.

**90 ára føðingardagur**
18. februar fyllir Edvard Petersen, Hósvík, 90 ár. Føðingardagurin verður hildin í Kollafirði hjá Hervør og Tórgrím Hansen, Inni í Firði frá kl. 17.

**80 ára føðingardagur**
Fríggjadagin 20. februar fyllir Erling Davidsen í Kvívík 80 ár. Dagurin verður hildin leygarkvøldið hjá dótruni í Steinagerði 8 frá kl. 18.00 øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagurin**
**16. februar. Juliana**, deyð umleið ár 300. Vildi ikki giftast heidna trúlovaða sínum og varð tikin av døgum. Er eisini navn á tveimum øðrum halgikvinnum. Giljanna er føroyski navanformurin. Juliana er rómverskt ættarnavn.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

## Stevna í Odense

Leygardagin 7. mars hittast føroyingar í Odense. Tað eru Árni Helmsdal og onnur, sum bjóða øllum føroyingum at vera vælkomnar til Odense á stevnu.

Á skránni er bíbliuundirvísing, sangur, prát og ikki at gloyma – ein góður biti. Jógvan Zachariassen kemur at tala um evnið "Náðin í gerandisdegnum". Sangin-um taka fólk úr Kristnastovu sær av, meðan fólk úr Odense borðreiða.

Stevnan byrjar kl. 12 við einum bita og heldur áfram til einaferð út á kvøldið. Eins og undanfarin ár verður stevnan hildin á Kratholmskolen, Byghøjvej 27-29, 5250 Odense SV.

Tað er neyðugt at melda seg til stevnuna, so fyrireikararnir vita, hvussu nógv koma. Seinasta freist at melda seg til er 1.mars. Tilmelding fer fram hjá Árna Helmsdal á tlf. 30251373 (fartlf.) / 40869616 (heimatlf.) ella við at skriva teldupost til arnihelm@post.tele.dk.

